SOS05094?? 19/06/05 12:43 Page 7





- Hetta er tað besta árið hjá Krúnborg nakrantíð, sigur reiðarin, Sámal Jacobsen

Krúnborg:

# Góðar sølur í Skagen

**Seinastu tveir túrarnar hevur svartkjaftatrolarin, Krúnborg, selt í Skagen. Veiðan hvønn túrin vá sløk 3.000 tons, og prísurin hevur ligið um 68 oyru fyri kilo, sum er 18 oyru meira, enn prísurin um hetta mundið var í Føroyum**

SVARTKJAFTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Saman við øðrum føroyskum og útlendskum svartkjaftaskipum, er Krúnborg aftur til fiskiskap vestanfyri Føroyar. Men báðar túrarnar undan hesum, seldi Krúnborg í Skagen.

Sámal Jacobsen, reiðari, sigur, at hetta vóru tveir rættiliga góðir túrar.

- Veiðan hvønn túrin vá sløk 3.000 tons, og prísurin var 68 oyru fyri kilo. Um somu tíð, var prísurin á svartkjafti á Havsbrún 50 oyru fyri kilo. Haraftrat kemur, at oljan í Danmark er eini 25-30 oyru bíligari fyri liturin enn í Føroyum. So, samanlagt vóru hetta tveir rættiliga góðir túrar, sigur hann.

Um orsøkina til, at Krúnborg fór niður til Danmarkar at landa, sigur Sámal, at tað snøgt sagt ikki var pláss í Fuglafirði, tí so nógvar svartkjaftalandingar vóru um hetta mundið.

### Eitt gott ár

Reiðarin sigur, at eingin ivi er um, at leingjanin av skipinum hevur verið ein góð íløga fyri reiðaríið.

- Eg haldi, at hetta árið higartil hevur verið hitt besta hjá Krúnborg nakrantíð, sigur hann.

Sámal væntar, at árið higartil eisini hevur verið tað besta hjá hinum svartkjaftatrolarunum í flotanum.

- Skipini eru størri og effektivari, og fiskiskapurin higartil í ár hevur vignast væl, sigur hann.

Reiðarin fýlist tó á, at tað er rættiliga trongt á svartkjaftaleiðunum vestanfyri, tí talið av russarum er so stórt.

- Eg haldi, at føroyskir myndugleikar áttu at sett eina avmarking í talinum av skipum.

Hann sigur, at skipini taka nógv pláss, og stundum er rættiliga trongligt at royna.

- Tað er eisini hent, at okkurt trolið er farið, sigur Sámal Jacobsen, reiðari.

# Sólborg endar helst í Íslandi

**- Á veg yvir á Flemmish Kap hevði Sólborg nøkur hál í føroyskum øki - vestur ímóti markinum til Íslands, men fiskiskapurin var ikki lønandi, sigur Sámal Jacobsen, reiðari**

RÆKJUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rækjutrolarin, Sólborg hjá Eileri Jacobsen, hevur verið nógv umrøddur seinastu tíðina.

Sámal Jacobsen, reiðari, sigur, at skipið nú er á veg yvir á Flemmish Kap.

- Skipið er ikki selt; tað er farið til fiskiskap undir føroyskum flaggi – og undir okkara navni.

Sámal sigur, at tað serliga eru íslendingar, sum hava víst Sólborg áhuga, og hann væntar, at tað verða íslendingar, sum verða keypararnir, tá ið saman um kemur.

Hann sigur, at onkur fyrispurningur hevur eisini verið úr Spaniu.

Spurdur, um føroysk reiðaríir hava víst Sólborg áhuga, váttar hann, at fyrispurningar hava verið, men torført er at fáa fíggingina til eina vinnu, sum er í so stórum aldudali, sum føroyska rækjuvinnan er í løtuni.

### Bóru við rækjur

Sámal sigur, at hetta er tíðin, tá ið føroysk rækjuskip okkurt árið hava borið við stórar og góðar rækjur í føroyskum sjógvi vestur ímóti markinum til Íslands.

- Sólborg hevði nøkur hál á leiðini, nú teir vóru á veg vestureftir. Teir bóru við rækjur, men ikki í slíkum nøgdum, at fiskiskapurin er lønandi.

Hann vísir á, at vóru fleiri skip á leiðini, er hugsandi, at okkurt av skipunum hevði rakt við størri nøgdir, men oljan er dýr, og tí gjørdi Sólborg av at halda leiðina fram yvir á Flemmish Kap.

- Rækjurnar, sum skipini plaga at fáa í føroyskum sjógvi hesa tíðina av árinum, eru av sama slagi, sum stóru og reyðu rækjurnar í Grønlandi, sigur Sámal Jac-obsen.

Á Flemmish Kap liggja skipini í løtuni um eini 10 tons um samdøgnið, og siglingartíðin úr Føroyum er eini 5-6 samdøgur.

# Nógv norðhavssild - men lítil svartkjaftur

**- Fyribils útrokningar benda á, at tað er væl minni av svartkjafti í føroyskum øki í ár samanborið við seinasta ár. Tó er ymiskt, nær svartkjafturin kemur norður um Føroyar, og tí er ikki lætt at samanbera nøgdirnar í hesum øki ár undan ári, sigur Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur**

KANNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Magnus Heinason hevur verið norðanfyri og gjørt silda-og svartkjaftakanningar.

- Væl av norðhavssild var at síggja í føroyskum øki í mun til í fjør, men minni av svartkjafti.




*Útbreiðsla av sild í kanningarøkinum (ekkóvirðir norðanfyri Føroyar) Talva: Fiskirannsóknarstovan*

Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur, sigur, at sildin var góð; miðalvektin lá um 270 g., og sildin stóð mest sum í øllum norðrara parti av økinum, norðan fyri 63°20'N.

Hann vísir á, at sildin var stygg og ring at fáast við, og flestu torvurnar stóðu djúpari enn 200 metrar og vóru nakað spjaddar.

### Felags kanning

- Kanningin, sum er skipað undir ICES, er liður í eini felags kanning av sild og svartkjafti í økinum norðan fyri Føroyar, Norskahavinum og í Barentshavinum. Ísland, Noreg, ES og Russland taka eisini lut í hesi kanning.

Jan Arge Jacobsen sigur, at endaligu útrokningarnar av nøgdini av sild og svartkjafti verða tøkar í juni, og tá verða úrslitini frá øllum rannsóknarskipunum úr ymisku londunum eisini við.

- Útrokningar vísa, at nøgdin av sild norðanfyri Føroyar er umleið 1,8 miljónir tons, sigur hann.

### Svartkjafturin

Jan Arge Jacobsen sigur, at svartkjaftur er at finna í mest sum øllum økinum norðanfyri Føroyar. Tó eru nøgdirnar sera smáar í tí kalda sjónum norðaliga og vestaliga í økinum.

- Í syðra parti av økinum – norður úr kantinum, var svartkjafturin størri enn longur norðuri og eysturi. Hetta er svartkjaftur, sum hevur gýtt sunnanfyri og er á veg norður at leita sær føði.

Fiskifrøðingurin sigur, at svartkjafturin í landnyrðingspartinum út móti markinum var smærri og óbúgvin.

- Fyribils útrokningar benda á, at tað er væl minni av svartkjafti í føroyskum øki í ár samanborið við seinasta ár. Tó er ymiskt, nær svartkjafturin kemur norður um Føroyar. Summi ár er hann tíðliga á veg og onnur ár seinni; tí ber illa til at samanbera nøgdirnar í hesum øki ár undan ári, sigur Jan Arge Jacobsen.